# Semja millum

# Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya

# og

# Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2017 til 1. oktober í 2019. Semjan byggir á ein karm, sum er 2,3% fyrra árið og 2,5% seinna árið.

**Lønarhækkanir**
Tann 1. oktober í 2017 hækka allar mánaðarlønir 2,3%.

Tann 1. oktober í 2018 hækka allar mánaðarlønir 2,5%.

**Flokking av útbúgving:**
Í lønartalvuni verður við gildi frá 1. oktober 2018 ásett at: *Fulltrúar við 4½ ára útbúgving (t.d. master útbúgvingar uttanfyri Danmark) ganga stigini 1 til 8.*

**Broytingar í sáttmálatekstinum:**

**§ 6 um eftirlønargjald verður broytt:**
Ásetingin í stk. 3 verður strikað tann 1. oktober 2018, og kostnaðurin av tí roknaður av karminum 1.10.2018.

**§ 7 um barnferð verður soljóðandi (stk. 1 til og við 3 eru broyttar ásetingar, meðan stk. 4 til og við 7 ikki eru broytingar):**
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

**§ 22. Starvs- og lønaraldur verður broytt soleiðis:**
Stk. 3. Verður starvsfólk sett í starv, áðrenn tað hevur lokið útbúgvingina, ið treytað varð í starvslýsingini, verður tað við setan sett á lønarstig samsvarandi útbúgvingini, tað hevur lokið. Lýkur starvsfólkið seinni útbúgvingina, ið treytað varð í starvslýsingini, fær tað nýggja innplasering. *Ein bachelor, sum gerst kandidatur, skal soleiðis flyta yvir í kandidatstigan á stigið við sama nummari. Undantikið bachelorar á stigi nr. 1, sum flyta á stig nr. 2.* Lønaraldurin verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum við fyrru innplaseringina hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggju innplaseringini, fær longu frá hesum mundi nýggja aldursviðbót.

**§ 25 verður orðað soleiðis:**
Ein arbeiðsgevari kann, tá ið umstøðurnar tala fyri, tilnevna eitt starvsfólk sum serfrøðing. Mannagongdin er, at arbeiðsgevarin vendir sær til sítt aðalráð (er tað ikki aðalráðið sjálvt), sum síðan vendir sær til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum at fáa tað góðkent. Verður tað góðkent, kann arbeiðsgevarin fyri eitt ávíst tíðarskeið ikki longri enn 3 ár í senn, tilnevna starvsfólkið sum serfrøðing, og veita eina serfrøðingaviðbót upp í 4.000 kr. um mánaðin. Verður umbønin ikki góðkend, grundgevur Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum fyri tí. Umbønin kann ikki verða noktað aleina við tilvísing til, at talið av serfrøðingum er ella verður ov høgt.
Starvsfólkið skal hava minst 5 ára royndir frá viðkomandi starvi, ella samsvarandi eftirútbúgving/eykaútbúgving, og hava servitan á høgum fakligum stigi. Eisini er partur av metingini, um starvsfólkið antin hevur ávísan serligan førleika, sum starvið krevur, um starvið ber í sær ábyrgd út yvir tað vanliga, um starvsfólk í slíkum starvi er undir trýsti út yvir tað vanliga, ella um onnur serlig

viðurskifti gera seg galdandi. Í tilnevningini skal verða útgreinað, hvat tað er, sum ger, at hetta starvsfólkið verður tilnevnt serfrøðingur. Serfrøðingar eru ikki fevndir av § 24 um yvirtíð.

Sáttmálin er dagførdur og lønartalvurnar eru dagførdar eftir omanfyristandandi.

*Tinganes tann 12. september 2018.*

Búskapar- og Løgfrøðingafelagið

Jógvan Svabo Samuelsen
formaður

Jóannes N. Dalsgaard

Flóvin Eidesgaard

Halla Djurhuus

Leivur Persson

Fíggjarmálaráðið

Kristina Háfoss sign.
landsstýriskvinna

/

Jan Mortensen sign.